# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Politikararnir hava ikki lært av søguni

Í hesum døgum er sluttspurturin í tingarbeiðnum fyri hesa ferð. Í dag og í morgin eru umleið fimtan mál á skránni – fyri hvønn dagin. Talan er um 1., 2. og 3. viðgerðir og svar upp á fyrispurningar. Fríggjadagurin í næstu viku verður dýri biðjudagur, og tá hevur ætlanin verið, at tingið skal vera farið í summarfrí inntil á ólavsøku, um einki stingur seg upp, sum krevur, at tingið í skundi verður kallað saman.

Meðan teir knógva undir stóru arbeiðsbyrðini hava tað í vikuni verið nakrir tingmenn, sum hava givið til kennar, at hetta ber ikki til: Ov nógv mál verða viðgjørd upp á ov stutta tíð, og harvið er møguleikin stórur fyri, at kvaliteturin í arbeiðnum ikki verður so góður, sum hann kundi havt verið, um málini vórðu meiri íligin, tá ið tey vórðu avgreidd.

Søgan er tann sama, sum hon er so at siga á hvørjum ári. Fittan part av tingárinum, sum er frá ólavsøku og til á ólavsøku, ganga tingmenn og bíða eftir landsstýrinum, sum ber tey flestu málini í tingið upp undir ella eftir síðstu freistunum fyri jól og fyrst í mars mánað. Tá ið lítið er av lógaruppskotum at arbeiða við, seta tingmenn landsstýrisfólkunum fyrispurningar. So brúkar landsumsitingin tíðina upp á at svara fyrispurningum í staðin fyri at fyrireika lógaruppskot, og soleiðis heldur ringrásin á.

Í orðaskiftinum í hesi vikuni hevur løgtingsformaðurin sagt, at lógaruppskotini eru so mikið illa frágingin, tá ið tey verða borin frá landsumsitingini og til løgtingsumsitingina, at tað er neyðugt hjá hesi seinnu nevndu at gera stórt arbeiði, áðrenn uppskotini eru borðbar at leggja fyri tingið. Tað er vorðið sum ákæra, og hesta borðar frá, at tað tykist trupult hjá myndugleikunum at finna rætta stevið.

Ein tingmaður nevndi fyrrapartin av vikuni í Rás 2, at hann ikki skilti, hví tingið skal fara til hús í næstu viku. Hann vísti á, at tað er einki, sum forðar fyri, at tingið arbeiðir í nakrar vikur aftrat. Útsøgnin tykist skilagóð, og undir øllum umstøðum er tað soleiðis, at tá ið lógirnar eru samtyktar, so er tað bara tingið og ikki umsitingarnar hjá landsstýrinum ella løgtinginum ella landsstýrisfólkini , sum hava ábyrgdina. At arbeiðið eigur at verða lagt betri til rættis, soleiðis at tingið hevur nóg mikið at gera frá eina ferð í august og til út á várið, er púra upplagt. Seinastu seks árini hava allir flokkarnir verið partur av samgongum, og tað er skjótt at staðfesta, at politikararnir hvat hesum viðvíkur ikki hava lært av søguni.

Kanska nýggja tingárið fer at vera øðrvísi? Tað ber til at vóna, men vónin kann ikki vera grundað á søguligu gongdina!

**Sosialurin**

## Raðfesting





**KÁRI P. HØJGAARD OG KÁRI Á RÓGVI**
løgtingsmenn fyri Sjálvstýrisflokkin

Sjálvstýrisflokkurin fór á val uppá raðfestingar. Vit vildu raðfesta útbúgving, gransking, mentan og bleyt virði. Vit ávaraði ímóti at halda, at ráðini fóru at verða til nógvar, stórar og dýrar verkætlanir á íløgusíðuni.

Eftir valið hildu vit okkum til hesi lyftini. Vit vóru við í tvørpolitisku semjuni um skúladepil í Marknagili, so ungdómur okkara kann fáa gott í beinið og fortreyt verður fyri framtíðar vitanarbúskapi, ið skal bera vælferðina og bera tær íløgur, ið gera tað liviligari hjá fólki kring landið.

Sjálvstýrisflokkurin bjóðaði bæði CHE og ABC samstarv um raðfestingar og um neyðug tiltøk, vit vildu bæði taka tað súra og tað søta, uttan at krevja landsstýrisfólk ella nakað framíhjá til nøkur seráhugamál.

Seinastu tíðina hava vit tíverri staðfest, at allir hinir fimm flokkarnir lata sær lynda, at vit samtykkja íløgur uttan nakran íløgukarm, at landsstýri og fíggjarnevnd hava heilt hvør sínar raðfestingar, umframt at tingflokkar og teirra fíggarnevndarlimir ikki eru samdir um raðfestingarnar.

Sjálvstýrisflokkurin hevur kent seg noyddan at atkvøða ímóti nýggjum íløgum, inntil vit hava fingið semju um íløgukarm næstu árini og serliga, hvat rúmast innanfyri henda karmin. Vit hava atkvøtt ímóti verkætlanum, ið vit meta sum okkara hjartamál, samferðsluíløgum í Eysturoynni og í Norðoyggjum, sum vit annars hava ført fram sum raðfestingar, ið vit fegin sóu innan íløgukarmin.

Vit vita, at hetta kann kosta okkum, tí ólíka lættari er at samtykkja verkætlanir, ið síðani verða lagdar á ís, dragnar út ella spardar burtur. Men vit vilja ikki geva fólki falskar vónir og órealistiskar lyfti. Tá ið vit atkvøða fyri eini íløgu, so játta vit samsvarandi.

Hinir flokkarnir hava samtykt undirsjóartunnil til Sandoyar, teir liggja nú fyri at samtykkja ella kunngera íløgur fyri oman fyri tvær milliardir, ið allar skulu fremjast í senn ella innan sera stutt áramál. Bert fyri at taka úr rúgvuni, so valdi fíggjarnevndin uttanum samgonguskjalið at raðfesta tvey nýggj paralell berghol Norð um Fjall, hetta førdi til verklagslógaruppskot, sum Rættarnevndin økti í prísi við 64 milliónum til væl omanfyri 300 milliónir – áðrenn Sandoyartunnilin hevur fingið nakra millión – sama dag skjýtur fíggjarmálaráðharrin upp at lækka játtanina Norð um Fjall við 17,5 milliónum. Hetta merkir, at vit hava heimilað landsstýrismonnum at brúka ávíkavist 700 og 300 milliónir, men játta teimum bert ávíkavist 0 og 5 milliónir at bora fyri.

Vit eru í veruleikanum í einum valstríði við áhaldandi yvirbjóðingum. Vit kunnu ikki yvirganga hinar, men fara heldur at mæla til semju um raðfestingar.

## Danske kæmpe- og folkeviser

**ZAKARIAS WANG**



Hvør hevur lagt hesa bókina til rættis?

Hetta er nakað, sum Marianne Clausen hevur spurt meg, men eg veit ikki svarið. Eg havi so spurt meg fyri, men havi einki svar fingið.

Kann tað veruliga hugsast, at eingin veit, hvør ið hevur skrivað hesar vísur og fingið tær givnar út í 1903 hjá P/F Fram, sum annars er kent sum útgevari av Tingakrossi?

Henda bók er eitt megnarverk, og øll orsøk er til at vera errin av at hava fingið hana út. Tann, sum hetta hevur gjørt, má hava skyldfólk, og kann tað veruliga hugsast, at tey ikki eru errin av at hava ein so framúrskarandi rithøvund í síni ætt?

Tey, sum vita nakað, eru vælkomin at seta seg í samband við undirritaða.

## Vetrarins og summarsins

**EYÐUN Á BORG**



Í flaggsanginum syngja vit: »vetrarins ljóð« og »summarsins lot«.

Vetur er kallkynsorð og eitur vetrar í hvørsfalli, eintal, óbundið. Tí eitur tað vetrarins og ikki vetrarsins!

Summar er hvørkikynsorð og eitur summars í hvørsfalli, eintal, óbundið. Tí ber til at siga summarsins.

Spell, at sungið verður vetrarsins í almennum sangupptøkum!

E.S.: Eingir fosturlandssangir/flaggsangir í døgurðatónleikinum í Útvarpinum flaggdagin, sum siður hevur verið í hálva øld!? Er "tíðin" farin frá slíkum?

*Við várligari flaggkvøðu*

Á Borg á Argjum á gamla summarmála 2009

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.